tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 78 Mikudagur 24. apríl 1996 70. árgangur Krónur 7,00



## 36.500 dagar runnir síðani hon varð fødd

*Mánadagin fylti Malla í Sandavági 100 ár. Sosialurin ynskir henni hjartaliga tillukku við degnum. Í 2'aranum leygardagin prenta vit samrøðu við hana*

**Oljufepurin var ein hvørvisjón:**

# Teir sum eiga jørð fáa ikki eitt klovið oyra

*Teir, sum eiga hagan, har borast skal í sambandi við oljuleitingina undir Føroyum, gníggjaðu hendurnar, tá ið tað var greitt, at borast skuldi longur niður. Teir væntaðu sær at spinna gull burturúr. Nú vríggja teir sær hendurnar, tí endin var, at teir fingu ikki eitt klovið oyra*

**Síða 9**

# Fótbóltslandsliðið skal í eldin í Beograd í kvøld

*Lesið stóru upptaktina inni í blaðnum, m.a. greinar frá okkara manni í Beograd*

**Síða 11, 12, 13 og 14**

# Gongur betur enn nakrantíð hjá Atlantic Airways



*Góða úrslitið í roknskapinum er prógv um at vit duga betur nú, og at Atlantic Airways fer at klára seg í framtíðini, sigur Eyðfinnur Jacobsen, nevndarformaður*

**Síða 3**

*Eyðfinnur Jacobsen er formaður í nevndini hjá Atlantic Airways*

*Magni Arge er stjóri í Atlantic Airways*



**BRÚKTIR BILAR**

**Nissan Cherry 1.3 DX**
ljósabláur, 5 hurðar, árg. 85
**6.000**

**Nissan Cherry 1.5 GL**
ljósabl., 5 hurð., 168.000 km
**5.000**

**Nissan Sunny 1.5 GL**
gráur, 4 hurðar, 168.000 km
**19.000**

**Nissan Sunny 1.5 GL Coup**
3 hurð., árg. 85
**4.000**

**Nissan Sunny 1.6 LX St. car**
5 hurð., árg. 89, 110.000 km
**39.000**

**Nissan Patrol 3.3 Turbo H/T**
reyður, 3 hurðar, árg. 85
**55.000**

**Peugeot 205 Multi Van Bensin** hvítur, 3 hurðar
**16.000**

**Daihatsu Ferosa**
silvurgr., 3 hurð., árg. 91, 155.000 km
**49.000**

**Ford Escort 1.6 Ghia**
sv., 5 hurð., árg. 87, 93.000 km
**34.000**

**Ford Escort 1.6 LX**
v. skaða, beige, 5 hurð., árg. 85, 98.000 km
**2.000**

**Opel Ascona 1.6S LS**
beige, 4 hurðar, 130.000 km
**25.000**

**Opel Omega 2.0 Aut.**
ljósabl., 4 hurðar, 335.000 km
**42.000**

**Suzuki Swift GL**
gráur, 3 hurð., 150.000 km
**19.000**

**Toyota Hi Ace bensin**
hvítur, 4 hurð., árg. 87, 95.000 km
**25.000**

**P/f MEINHARDT ARGE**
Staravegur 5
Tórshavn
**Tlf. 16161**


*Lærarastræðan á Sankta Frans Skúla útsett eitt ár:*

# Hjørleif Kúrberg misti ikki starvið

ÁKI BERTHOLDSEN

Lærarastrætan á Sankta Frans Skúla er ikki loyst.

Men hon er útsett eitt ár.

Fríggjadagin samtykti ein meiriluti í landsskúlaráðnum at Hjørleif Kúrberg kann ikki setast í fast starv, sum skúlaráðið í Havn hevði mælt til.

Men teir koyrdu hann heldur ikki úr starvinum sum landsskúlafyrisitingin hevði mælt til.

Niðurstøðan hjá landsskúlaráðnum er, at umstøðurnar í hesum máli eru so serligar, at Hjørleif Kúrberg skal verða verandi í starvinum skúlaárið 1996-1997 undir somu treytum, sum nú.

Landsskúlaráðið býtti seg í ein meiriluta við trimum limum og ein minniluta við tveimum limum.

Hensar Ellingsgaard vil ikki siga, hvør var í meirilutanum og hvør var í minnilutanum.

Men vit hava fingið upplýst, at í meirilutanum vóru Niels Nattestad, Niels Petur Nolsøe og Jákup Mikkelsen.

Í minnilutanum vóru Alis Jacobsen og Eyðgunn Samuelsen.

Við hesi salomonsku loysn gekk landsskúlaráðið øllum pørtum í málinum eitt sindur á móti.

Landsskúlafyrisitingin vísti á, at Hjørleif lýkur ikki treytirnar fyri at hava starv í fólkaskúlanum.

Logiska avleiðingin av hesum er, at hann fer úr starvinum, hóast einki verður sagt um tað.

Skúlaráðið í Havn mælti hinvegin til at hann varð settur í fast starv.

Landsskúlaráðið sigur í niðurstøðu síni, tað er ikki heimild at seta Hjørleif Kúrberg í fast starv, tí møguligur umsøkjarir við útbúgving eru til alla undirvísing á skúlanum.

Hinvegin eru umstøðurnar í hesum málið so serligar at Hjørleif heldur fram í starvinum eitt skúlaár afturat.

## Fekk 10 ár

Forsøgan til ósemjuna um Hjørleif Kúrberg er, at í 1985 varð tann privati Sankta Frans Skúli lagdur undir kommununa og kom soleiðis undir vanligu lógirnar um skúlafyrisiting.

Á skúlanum vóru fýra lærarar við ongari útbúgving og teir fingu 10 ár at fáa greiði á sínum viðurskiftum.

Í 1995 var freistin farin, men enn vóru tveir lærarar á skúlanum, við ongari útbúgving. Hjørleif Kúrberg og ein nunna, Systir Cecilia.

Hon hevur sagt upp til í summar.

Men eftir er so Hjørleif, sum trætan hevur verið um í meiri enn eitt ár.

Teir lærarar, sum hava fólkaskúlaútbúgving, hava framíhjárætt til lærarastørvini.

Lærarafelagið gjørdi beinanvegin greitt, at tað góðtók ikki, at lærari við ongari útbúgving varð settur í fast starv, til hann skuldi fara við pensión, samstundis sum útbúnir lærarar missa starvið hvørt ár.

Ført hevur verið fram, at teir óútbúnu lærararnir við Sankta Frans Skúla hava havt góðar treytir, tí tað er ikki hvør sum helst, ið fær 10 ára uppsagnartíð.

Nú hevur hann so fingið 2 ár afturat.

Sjálvur vil Hjørleif treyðugt úr starvinum og endin var, at málið kom upp á hægstu rók í føroyska skúlaverki.

Skúlaráðið kann kæra avgerðina hjá landsskúlaráðnum um fyri landsstýrinum.



*Tað verður neyvan nakar trupulleiki at fáa boriætlanina góðkenda*

# Boringin verður góðkend í hesi vikuni

ÁKI BERTHOLDSEN

Heilsufrøðiliga Starvsstovan er komin rættiliga langt í arbeiðnum at umhvørvisgóðkenna ætlaðu boringina í Lopra.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan fekk ikki tilfarið, hon skuldi brúka, fyrrenn síðst í apríl.

Men tað var rættiliga greitt og fullfíggjað og tí er hon næstan liðug við arbeiðið.

Jákup Pauli Joensen, á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sigur at hann roknar við, at tey verða liðug í hesi vikuni.

Men so er ein kærufreist uppá fýra vikur. Kæra kunnu kommunan, landslæknin og tey, sum hava seráhuga mál í økinum.

Landsstýrið skal viðgerða møguligar kærur.

## Dálking

Jákup Pauli Joensen sigur, at uppgávan hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni er at kanna eftir, um hugsast kann at umhvørvið verður dálkað í sambandi við boringina.

Tað, vit skulu kanna, er, um boringin kann elva eitt andi dálking ella oestetisk viðurskifti annars, sigur hann.

Fyrst og fremst verður hugsað um, antin nakað kann hugsast at renna frá boringini og dálka náttúruna, t.d. hagan, møluna og sjógvin.

Tvs, at vit hava kannað, um tað, sum kemur upp úr borholinum, verður goymt forsvarliga, eins og tann borilógur og annað, sum brúkt verður.

Og annars verður hugt eftir, hvussu teir hava skipað borioki fyri ikki at dálka náttúruna.

Men hann væntar tó, at eingir trupulleikar fara at standast av arbeiðnum.

Teir vísa seg at vera væl útgjørdur so at einki skal kunna renna frá.


**HEGN & PELAR**
Vit hava hegn og pelar fyri sera samuligar prísir.
P/f Langasandur
Timburhandil
Tlf. 21010



**VIKU-TILBOÐ**
PIZZA nr. 15 v/ osti, tomatum, oksakjøti, ananas, leyki, mais, fleski og oregano
Sodavatn og ís til dessert
kr. 98,-



